LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 17. februar 2016
J.Nr.: LUM-28- 15/00094-31
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagum um starvssetanir í Suðuroyar musikkskúla

Við skrivi, dagfest 16. februar 2014 sendi A umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Hendan klagan er stílað Løgtingsins umboðsmanni í sambandi við, at nýtt musikkleiðarastarv varð sett í Suðuroyar musikkskúla í august mánaði 2013 – uttan at starvið varð lýst leyst. Hesum viðvíkjandi vil eg vísa mína ónøgd, tí at hetta er eitt alment starv, sum øll við kravdum førleika eiga at hava møguleikan at søkja.
>
> Leggjast skal aftrat, at hetta er ikki fyrstu ferð, at hetta fer fram í musikkskúlanum í Suðuroy. Undanfarni leiðarin B varð eisini settur í starv, áðrenn starvið var lýst leyst proforma.
>
> Í januar mánaða í ár er lærari í messing settur, uttan at starvið er lýst leyst. Undirritaði ger nú vart við hesi viðurskifti, tí at tey alt ov oftani koma fyri í musikkskúlaskipanini."

Við skrivi dagfest 30. juni 2015 sendi A umboðsmanninum soljóðandi klagu :

> "Undirritaði vil við hesum skrivi klaga um setan av leiðara í Suðuroyar musikkskúla.
> Suðuroyar musikkskúli søkir eftir leiðara í Sosialinum tann 15 apríl 2015, umsóknarfreistin var tann 30. apríl 2015 og skrivar, at umsøkjarin skal hava musikkonservatorium ella líknandi útbúgving, og at tað er ein fyrimunur, um hann longu arbeiðir í musikkskúlanum.
>
> Tað vóru fýra umsøkjarar til leiðarastarvið. Tveir við útbúgving frá Kongaliga Konservatorienum í Keypmannahavn, ein við útbúgving frá Reykjavik College Of Music, og ein uttan útbúgving frá konservatorium ella líknandi - men hevur ABRSM royndirnar, sum musikkskúlin brúkar. Hetta eru royndir, sum kunnu kvalifisera teg til at koma inn á eitt konservatorium ella á eitt College Of Music.
>
> Musikkskúlanevndin er samansett av einum nevndarlimi frá hvørjari kommunu, altso sjey nevndarlimir, sum ongar fakligar førleikar hava innan musikkskúlaøkið.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Tað var eingin setanarbólkur settur, tað vóru ongar setanarsamrøður gjørdar, og man setti sama persón aftur í leiðarastarvið, sum var settur fyri átta árum síðani, uttan nakra útbúgving innan tónleik. Ein undrast á, hví ein skal fara uttanlanda at nema sær útbúgving.

Tað er mín vón, at tit taka hetta málið upp, tí hetta óskilið hevur staðið uppá alt ov leingi. Tað kann ikki vera rætt, at nepotisma og vina-/kenningapolitikkur skal stýra í hesum landinum, vit búgva í."

**Málsgongd**

Av tí at viðgerðin av fyrru klaguni ikki varð liðug, tá seinna klagan varð móttikin, og málini bæði snúgva seg um mannagongd í samband við starvssetanir í Suðuroyar musikkskúla, avgjørdi umboðsmaðurin at viðgera báðar klagurnar í sama áliti.

Fyrrverandi leiðarin fyri musikkskúlan í Suðuroy og ein lærari søgdu upp og fóru úr starvi 1. desember 2013. Í tí sambandi skuldi nýggjur leiðari og lærari setast.

Í fyrstu atløgu vóru størvini ikki lýst leys. Nevndin fyri musikkskúlan í Suðuroy heitti á ein fyrrverandi leiðara fyri musikkskúlan í Suðuroy um fyribils at átaka sær starvið sum leiðari. Leiðarin fyri musikkskúlaskipan Føroya heitti á ein lærara at undirvísa 10 tímar um vikuna frá 13. januar 2014 og í mesta lagi 3 mánaðar fram.

Av frágreiðing frá fundi í nevndini fyri musikkskúlan í Suðuroy tann 4. november 2013 framgongur soleiðis :

"B, sum er leiðari fyri Suðuroyar musikkskúla, hevur sagt seg úr starvi frá 01.12.2013. Nevndin hevur heitt á D, sum áður hevur roynt seg sum leiðara og undirvísir á Sumus, um fyribils at taka við leiðarastarvinum. Nevndin hevur samtykt, at tá søkjast skal eftir nýggjum leiðara er ynski um, at tað ikki bara skal søkjast í Føroyum, og at leiðarin, sum settur verður, skal hava pedagogiska útbúgving eisini ...."

Av frágreiðing frá fundi í musikkskúlanevndini 27. november 2013 framgongur soleiðis :

"...1.Tímafordeiling og lýsing eftir nýggjum lærarum.

Tosað bleiv um, hvussu verður við tímunum, ið B og E hava undirvíst í, nú tey fara...

D sigur, at tað er brúk fyri messinglærara eisini við tí í huga, at vit hava eitt hornorkestur í Suðuroy, ið vit fegin vilja hava eitt gott samstarv við.

F hevur tí tað uppskot, at G fær teir 10 tímarnar, ið E hevur havt, til at undirvísa í messing í einum fyribils starvi.

Hetta samtykti nevndin..."

<u>Lærarastarvið</u> varð síðan lýst leyst í mars 2014 við hesi lýsing frá Musikkskúlaskipan Føroya :

**"Musikkskúlaskipanin søkir eftir lærara**

At undirvísa 10 tímar um vikuna í messingljóðføri í Suðuroyar musikkskúla.

Setanin er galdandi frá 07.04.2014 og restina av skúlaárinum.

Lokið prógv frá musikkonservatorium krevst... Umsóknarfreist : 05.04.2014... Musikkskúlaskipan Føroya ...”

Leiðarastarvið varð lýst leyst í apríl 2014, men við tíðaravmarkaðari setan fyri tíðarskeiðið 1. august 2014 – 31. juli 2015. Lýsingin var soljóðandi :

**“Leiðari til Musikkskúlan í Suðuroy**

Musikkskúlin í Suðuroy søkir eftir leiðara.

Ynskir tú at verða við til at menna tónleikaevni og fimi næmingsins, loysa og aga skapandi megi hansara og geva hvørjum næmingi sær størri møguleika til at uppliva og meta um tónleik og at leggja støði undir einum ríkum tónleikavirksemi í oynni, so er hetta arbeiðið júst nakað fyri teg.

Tú kemur at samarbeiða við heimini, skúlan, tónleikafeløg og onnur, ið hava áhuga innan hetta økið.

Musikkskúlin væntar at umsøkjarar skulu:

- hava kunnleika til musikkskúlaarbeiði
- vera kveikjandi
- duga at skipa fyri
- hava góð samstarvsevni

Setanartíðarskeið: 1. august 2014 - 31. juli 2015…

Arbeiðstíðin er 10 tímar um vikuna svarandi til 1/2 tíð sambært sáttmálanum hjá Føroya Musikklærarafelag.

Umsóknarfreist: 2. mai 2014 …

Nevndin hevur rætt at velja umsóknir frá, um tær ikki lúka settu krøvini...”

Tríggir umsøkjarar vóru til starvið. Av teimum sjey limunum í musikkskúlanevndini vóru tríggir valdir at hava setanarsamrøðurnar. Samrøður vóru við allar tríggjar umsøkjararnar og gjørdu teir tríggir nevndarlimirnir so tilmæli til samlaðu nevndina. Klagarin og fyribilssetti leiðarin høvdu søkt starvið, og avgjørdi musikkskúlanevndin at seta fyribilssetta leiðarin í starv fyri skúlaárið 2014/2015.

Leiðarastarvið varð aftur lýst leyst í apríl 2015. Hendan lýsing frá nevndini fyri Suðuroyar musikkskúla varð einsljóðandi, sum fyrra lýsingin eftir leiðara, burtursæð frá, at nú er talan um tíðaravmarkaða setan frá 1. august 2015 til 31. juli 2018, og nú verður eisini skrivað, at musikkskúlin væntar, at umsøkjarar skulu :

”…hava útbúgving frá musikkonservatorii el. líknandi…

> Tað er ein fyrimunur at vera lærari í musikkskúlanum..."

Til leiðarastarvið vóru fýra umsøkjarar, harímillum tíðarsetti leiðarin og klagarin. Ongar setanarsamrøður vóru hildnar, og á fundi 18. mai 2015 avgjørdi musikkskúlanevndin at seta tíðarsetta leiðaran í 3-ára tíðaravmarkaða starvið.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna málini nærri.

Í mun til fyrru klaguna bað umboðsmaðurin tann 25. februar 2014 Tvøroyrar Kommunu um eina frágreiðing um setan av leiðara fyri Suðuroyar musikkskúla og at lata umboðsmanninum øll viðkomandi skjøl.

Tvøroyrar Kommuna svaraði við skrivi dagfest 3.mars 2014 :

> "Í Suðuroynni eru allar kommunurnar felags um ein musikkskúla, Suðuroyar musikkskúla. Kommunurnar hava smb. § 8 stk. 1 í rundskrivi um musikkskúlar dagfest 28. januar 1985 valt ein lim hvør í hesa nevnd.
>
> Mannagongdin, tá leiðari verður settur í Suðuroyar musikkskúla er, at tað er nevndin fyri musikkskúlan, ið setur leiðaran. Tvøroyrar Kommuna hevur tískil ikki viðgjørt hetta setanarmál, ei heldur hevur kommunan nøkur skjøl í málinum. Viðmerkjast skal, at nevndin eisini hevur sett undanfarna leiðara."

Vísandi til svarið frá Tvøroyrar Kommunu bað umboðsmaðurin Tvøroyrar kommunu upplýsa, hvør sat í nevndini fyri musikkskúlan í Suðuroy, at fáa til vega skjalatilfarið um at seta leiðaran og møguliga avtalu millum kommunurnar um musikkskúlan í Suðuroy. Tvøroyrar Kommuna sendi umboðsmanninum umbidna skjalatilfarið 13. mars 2014 og reglugerðina fyri musikkskúlan í Suðuroy.

Millum skjølini frá Tvøroyrar kommunu var teldupostur frá 12. mars 2014, har nevndarformaðurin skrivar soleiðis um fyribilssetanina av leiðaranum restina av skúlaárinum 2013/2014 :

> "... Grunden til, at man valgte ikke at slå stillingen op og konstituere en leder, var, at man ville skabe så lidt uro som muligt midt i et skoleår, og man ville have tid til at finde den rigtige leder. Inden for skolevæsenet er det almindeligt at skifte stilling ved skoleårets begyndelse, så det ville forventeligt give flere ansøgere at slå stillingen op til det nye skoleår..."

Eisini sendi kommunan umboðsmanninum reglugerðina fyri Musikkskúlan í Suðuroy.

Tann parturin av klaguni, sum snýr seg um setan av lærara í januar 2014, varð tann 25. februar 2014 eisini send til Mentamálaráðið og musikkskúlaskipanina til ummælis. Vísandi til svarið frá Tvøroyrar kommunu um setan av leiðara fyri Musikkskúlan í Suðuroy varð Mentamálaráðið

tann 6. mars 2014 eisini biðið um at greiða frá sínum sjónarmiðum um, hvør hevur heimild at seta leiðaran fyri musikkskúlan í starv.

Skrivið frá umboðsmanninum dagfest 6.mars 2014 til Mentamálaráðið varð soljóðandi :

> "Sambært skrivi dagfest 25. februar 2014, heitti umboðsmaðurin á musikkskúlaskipanina um at greiða frá eini setan av lærara í Suðuroyar musikkskúla...
>
> Tvøroyrar kommuna hevur nú svarað umboðsmanninum. Avrit av svarinum er viðlagt.
>
> Sambært Tvøroyrar kommunu er Suðuroyar musikkskúli knýttur at einum kommunalum felagsskapi, ið fevnir um allar kommunurnar í Suðuroynni, og tað er nevndin, jbr. § 8, stk. 1 í rundskrivi um musikkskúlar, sum hevur sett leiðaran.
>
> § 8 í rundskrivi nr. 1 frá 28. januar 1985 um musikkskúlar er soljóðandi:
>
>> "**§ 8.** Fyri teir kommunalu ella interkommunalu musikkskúlarnar kann nevnd verða sett til tess at skipa fyri undirvísingini í umveldinum. Bý-/bygdarráðið setir hesa nevnd, sum í hesum sambandi skal umboða fyritakssemið á staðnum.
>> *2. stk.* Bý-/bygdarráðið setir ein leiðara, ið hevur ta dagligu leiðsluna av musikkskúlanum á staðnum."
>
> Umboðsmaðurin fer í hesum sambandi at heita á Mentamálaráðið um at greiða frá sínum sjónarmiðum um hendan spurningin, t.e. hvør hevur heimild at seta leiðaran fyri musikkskúlan í starv, jbr. at tað í § 8, stk. 2 í sama rundskrivi er ásett, at tað er bý- ella bygdaráðið, sum setir leiðaran, eins og Mentamálaráðið verður biðið um at meta um, hvør nevndi myndugleikin er í ítøkiliga førinum..."

Í svarskrivi frá musikkskúlaskipanini, dagfest 16. mars 2014, verður upplýst :

> "...G starvast í eini fyribils setan í 3 mánaðir í Suðuroyar musikkskúla. G byrjaði 13. januar 2014...
>
> **Frágreiðing**: Suðuroyar musikkskúli hevur leingi havt ynski um at bøta um næmingatilgongdina innan messingljóðføri. Tá tveir lærarar góvust 1. desember 2013, gjørdist møguleiki at gera eitt átak fyri at betra um tilgongdina innan undirvísingina í messingljóðføri.
>
> Eftir samráð við nevndina í Suðuroyar musikkskúla, spurdi eg G, um G vildi royna at ferðast suður fyri at loysa uppgávuna, so at vit kunnu vita, hvussu tað man fara at hilnast við einum nýggjum andliti...
>
> G hevur kravdu útbúgving... Í viku 12 verður lýst eftir lærara at undirvísa í messingljóðføri í Suðuroy. Umsóknarfreistin verður 5. apríl 2014. Tann setanin verður galdandi frá 7. apríl og restina av skúlaárinum. Hesir somu 10 tímarnir verða lýstir leysir aftur at søkja til skúlaársbyrjan í august 2014. Lýsingin verður ætlandi í apríl 2014.
>
> Musikkskúlaskipanin hevur síðan byrjan lýst øll leys størv og allar tímar.

> **Leiðari á staðnum**: Í skrivi tykkara verður sagt frá, at klaga er eisini um setan av leiðara á staðnum. Í Suðuroy hava tær 7 kommunurnar eitt umboð hvør í musikkskúlanevndini fyri Musikkskúlan í Suðuroy. Soleiðis hevur verið heilt frá byrjanini í 1984/1985.
>
> Nevndin søkir eftir og setir ein leiðara á staðnum. Eingi formlig krøv eru sett tí lokala leiðaranum, hvørki í lóg ella í rundskrivi. Nýggja forkvinnan H ringdi til mín í februar við fyrispurning um, hvussu tey best kundu gera við lýsing eftir lokalum leiðara.
>
> Hin 24 februar 2014 sendi eg henni ein teldupost við viðfestum uppskoti til lýsing eftir leiðara í Musikkskúlanum í Suðuroy...Hendan sama lýsingin varð brúkt í 2006. Nevndin fyri Musikkskúlan í Suðuroy hevur áður lýst eftir og sett leiðara, eisini í 2006..."

Í skrivi, dagfest 19. mars 2014, sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar um setanarheimildina:

> "...Sambært § 8 stk. 1 í rundskrivinum ( frá 28. januar 1985 ) kann nevnd setast fyri teir kommunalu ella interkommunalu musikkskúlarnar at skipa fyri undirvísingini í umveldinum. Bý- og bygdarráðið setir hesa nevnd, sum í hesum sambandi skal umboða fyritaksemi á staðnum ...
>
> Í løgtingslógini um stuðul til musikkskúlar, er einki beinleiðis nevnt um lokalan musikkleiðara hjá kommunum ella interkommunalari skipan. Helst átti ein áseting at staðið í lógini um hesi viðurskifti. Talan er um eldri lóggávu, sum helst átti at verið endurskoðað og dagførd.
>
> Sambært § 5 í lógini um stuðul til musikkskúlar er ásett, at landsstýrismaðurin setir lærarar í starv í musikkskúlanum eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu ella kommunufelagsskapi ella nevndini fyri musikkskúlan. Í praksis er tað musikkskúlaleiðarin, sum settur er sambært § 6 í lógini, sum vegna landsstýrismannin setir lærararnar í musikkskúlanum, eftir at hava fingið omanfyri nevnda tilmæli.
>
> Tá talan er um at seta leiðara, sum hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum í einari kommunu, metir Mentamálaráðið, at tað er bý/ - bygdaráðið, sum er setanarmyndugleiki- hetta sambært § 8 stk. 2 í rundskrivinum.
>
> Er hinvegin talan um interkommunalan musikkskúla, sum fleiri kommunur varða av, metir Mentamálaráðið, at hesar kommunurnar í felag hava delegerað setanarmyndugleikan til interkommunalu nevndina hjá musikkskúlanum. Sambært § 8 stk. 1 í rundskrivinum kunnu kommunurnar skipa eina nevnd at skipa fyri undirvísing í interkommunala musikkskúlanum. Talan er sostatt um eina sjálvbodna skipan og ikki um nakað krav. Henda skipan hevur verið praktiserað soleiðis síðani í 1985.
>
> Musikkskúlin í Suðuroy er at meta sum interkommunalur, av tí at allar kommunurnar í Suðuroy eru við í musikkskúlasamstarvinum.
>
> Upplýsast skal, at Mentamálaráðið er ikki við í setanartilgongdini av lokala musikkleiðaranum, av tí at talan er um eina reina kommunala uppgávu."

Í skrivi frá 26. mars 2014 bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið um at upplýsa, hvussu aðrir musikkskúlar í landinum eru skipaðir, herundir um fleiri eru skipaðir sum interkommunalir skúlar, og hvør setanarmyndugleikin er, tá leiðari verður settur á hesum skúlum. Mentamálaráðið gav umboðsmanninum umbidnu upplýsingarnar 28. mars 2014, har tað

framgongur, at tað bert er í Sandoyar musikkskúla og Suðuroyar musikkskúla, at leiðarin ikki er settur beinleiðis av bý- ella bygdaráðunum.

Við skrivi, dagfest 21. oktober 2014, boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at grundað á stóra arbeiðsbyrðuna á stovninum, verður viðgerðin av klaguni ikki liðug fyrr enn fyrst í komandi ári.

Eftir at seinna klagan, dagfest 30. juni 2015, varð móttikin, bað umboðsmaðurin Tvøroyrar kommunu at útvega sær viðkomandi skjøl viðvíkjandi setanini av leiðara í Suðuroyar musikkskúla fyri tíðarskeiðið 1. august 2015 til 31. juli 2018 og at gera viðmerkingar til málið. Vísandi til, at Mentamálaráðið í sínum hoyringarskrivi metti, at kommunurnar í Suðuroynni í felag hava delegerað setanarmyndugleikan til interkommunalu nevndina hjá musikkskúlanum, bað umboðsmaðurin Mentamálaráðið og kommunudeildina í Almannamálaráðnum meta um, hvørt kommunurnar í Suðuroynni á lógligum grundarlag høvdu flutt musikkskúlanevndini heimildina at seta leiðaran í musikkskúlanum.

Almannamálaráðið svaraði í telduposti tann 9. juli 2015, at ráðið metti Mentamálaráðið vera rætta myndugleika at taka støðu til heimildina.

Við skrivi frá 26. august 2015 sendi Tvøroyrar kommuna tað skjalatilfar, ið kommunan hevði fingið frá formanninum í nevndini fyri Suðuroyar musikkskúla um setanina av leiðara. Millum skjølini var frágreiðing frá formanninum í musikkskúlanevndini, har hann viðmerkti soleiðis í frágreiðing dagfest 20. august 2015 :

> "Musikkskúlanevndin som ansættelsesmyndighed. Jeg blev valgt i nevndin i foråret 2013 og blev ved bestyrelsesmødet den 6/5 valgt til formand. Da jeg var ny i nevndin har jeg bygget videre på tidligere gældende praksis. Det er rigtigt, at der i reglugerðin for musikskolen står, at nevndin laver indstilling til kommunerne ang. ansættelse af leder. Jeg har spurgt mig for hos den tidligere formand I. Hun siger, at gældende praksis siden musikskolens start har været, at nevndin tilnævner lederen. Hun var selv med til at lave reglugerðin, men husker ikke, hvordan sætningen ang. indstilling af leder kom ind. Hun mener ligesom jeg, at det ville blive en ekstrem tung proces, hvis man skulle kære en ansættelsessag gennem 7 kommunalbestyrelser. Ifølge reglugerðin er alle kommuner repræsenteret i nevndin på lige fod, og det er tolket, som man har uddelegeret ansvaret til nevndin.
>
> Den konkrete ansættelsessag:
>
> I efteråret 2013 opsagde daværende leder B sin stilling pr. 1/12. Da det var midt i et skoleår, fandt nevndin det bedst at konstituere D, der var lærer i Musikskolen, som leder for resten af skoleåret. D har tidligere været leder af Musikskolen, men opsagde på daværende tidspunkt sin stilling, da familien flyttede nordpå.
>
> Stillingen blev slået op i bladene og på nettet i foråret 2014. I annoncen blev ikke nævnt, at man ønskede en person med musikuddannelse. Dette blev påtalt af J, formand for musiklærerforeningen.

Der indkom 3 ansøgninger, D, der har ABRSM eksamen på højeste niveau, A, der har Bachelor fra Island og en, der ikke havde musikuddannelse... Jeg forhørte mig hos F, leder af Musikskolen på Færøerne angående vægtning af de pågældende uddannelser. Han sagde, at ABRSM eksamen fagligt er sidestillet med en bacheloreksamen og har været godkendt til ansættelse i musikskolen.

Ved tidligere ansættelser i musikskolen har det været kutyme, at hele nevndin har fungeret som ansættelsesudvalg og har deltaget i samtaler. Jeg, som nyvalgt formand, mente, at det var en meget stor gruppe at have til en ansættelsessamtale, og foreslog man skulle nedsætte et mindre udvalg. Jeg, K og L kom i ansættelsesudvalget. Der var ønske om at få F som repræsentant for musikskolen i udvalget, men han ønskede ikke at deltage, da han var for tæt på klagemyndigheden Mentamálaráðið.

Vi indkaldte alle tre ansøgere til samtale. Jeg interviewede, og de to andre tog notater. Vi lavede hver vores indstilling (vedlagt) som blev forelagt nevndin. Da vi desværre ikke kunne enes om indstillingen til resten av nevndin, kom det til afstemning. D blev ansat for skoleåret 2014 -15.

Ansættelsesproceduren blev senere evalueret. Der var enighed i nevndin om, at alle skulle være med til samtalerne næste gang, da det ikke havde været tilfredsstillende at skulle tage stilling til ansættelse ud fra et referat af samtalerne.

Da stillingen kun blev sat for et år, måtte den slås op igen i foråret 2015. Denne gang søgte vi efter en med uddannelse fra konservatoriet eller lign. Der kom fire ansøgninger. A og D søgte igen. Derudover kom to ansøgninger mere...

På mødet den 18/5 blev det enstemmigt vedtaget at ansætte D som leder. Han har det sidste år skabt ro omkring musikskolen, og samarbejdet mellem lærerne ser ud til at fungere godt. Man valgte ikke at afholde samtaler, da to af ansøgerne havde været til samtale året før. Ansøgeren med ... som hovedfag var ikke aktuel, da vi ikke har ...timer i skolen, og heller ikke udsigt til at få det. Den sidste ansøger er ..., så han blev ligeledes fravalgt. “

Í skrivi frá 21. september 2015 svaraði Mentamálaráðið fyrispurninginum frá umboðsmanninum um flyting av setanarheimildini. Ráðið skrivar soleiðis:

**“ Meting Mentamálaráðsins eftir áheitan frá Løgtingsins umboðsmanni**

Vísandi til skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 10. juli 2015, verður heitt á Mentamálaráðið um at meta um, hvørt allar sjey kommunurnar í Suðuroy á lógligum grundarlagi kunnu flyta interkommunalu musikkskúlanevndini heimildina at seta leiðara í Musikkskúlanum í Suðuroy.

Sum víst á í svari Mentamálaráðsins til Løgtingsins umboðsmann, dagfest 19. mars 2014, er setan av lokala musikkskúlaleiðaranum ein rein kommunal uppgáva, sum ikki kann kærast til Mentamálaráðið. Spurningurin frá Løgtingsins umboðsmanni átti tískil eftir meting Mentamálaráðsins heldur at verið settur avvarðandi kommunum í Suðuroy, ið standa við ábyrgdini fyri delegatiónini.

Sambært § 8 í rundskrivi nr. 1 frá 28. januar 1985 um musikkskúlar er tað ásett:

*"§ 8. Fyri teir kommunalu ella interkommunalu musikkskúlarnar kann nevnd vera sett til tess at skipa fyri undirvísingini í umveldinum, sum í hesum sambandi skal umboða fyritakssemið á staðnum.*

*Stk. 2. Bý- og bygdaráðið setir ein leiðara, ið hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum á staðnum."*

Sum tað sæst, er tað bý- og bygdaráðini, ið seta lokala musikkskúlaleiðaran. Hetta samsvarar eisini við § 6 í reglugerðini fyri Musikkskúlan í Suðuroy, har tað er ásett, at tað eru bý- og bygdaráðini, sum seta leiðaran eftir tilmæli frá interkommunalu musikkskúlanevndini. Spurningurin er sostatt, hvørt kommunurnar lógliga kunnu delegera setanarmyndugleikan, herímillum instruktións- og eftirlitsmyndugleikan til interkommunalu musikkskúlanevndina.

Í máli hjá Fólkatingsins umboðsmanni, FOB 2013.09, bls. 6 og 7, kom umboðsmaðurin við nøkrum almennum staðfestingum av galdandi rætti viðvíkjandi delegatión frá kommunustýrið til sjálvstøðug løgfrøðilig organ og kommunalar felagsskapir:

***"... I overensstemmelse med almindelige forvaltningsretlige grundsætninger kræver det særlige holdepunkter i lovgivningen at overføre kommunalbestyrelsens kompetence til udøvelse af myndighedsopgaver til et kommunalt fællesskab. Dette svarer til, hvad der efter almindelige forvaltningsretlige grundsætninger gælder for kommunalbestyrelsens delegation af myndighedsbeføjelser til en anden kommune og er begrundet i det forhold, at en fravigelse af den i lovgivningen fastlagte fordeling af ansvaret for udøvelse af myndighedskompetence kræver lovhjemmel..."***

**Meting í mun til ítøkiliga málið**

Soleiðis sum málið er háttað, hava kommunurnar í Suðuroy samsvarandi § 8, stk. 1 í rundskrivinum um musikkskúlar sett eina interkommunala musikkskúlanevnd til tess at skipa fyri undirvísingini, og nevndin umboðar fyritakssemið í umveldinum. Nevndin er mannað av einstaklingum, sum respektivu kommunurnar hava valt til endamálið.

Sambært § 6 í reglugerðini fyri Musikkskúlan í Suðuroy eru tað bý- ella bygdaráðini, ið eftir tilmæli frá nevndini, seta leiðsluna. Setanarmyndugleikin hjá bý- og bygdaráðunum er eisini niðurfeldur í § 8, stk. 2 í rundskrivinum um musikkskúlar. Tann parturin av arbeiðinum, sum viðvíkur rakstraruppgávum og praktiskari skipan av musikkskúlaundirvísingini kann samsvarandi vanligu reglunum innan fyrisitingarrættin við ávísari vissu lógliga delegerast til interkommunalu musikkskúlanevndina.

Møguliga kann mann siga, at tað er *identifikatión* millum interkommunalu musikkskúlanevndina og bý- og bygdaráðið skilt á tann hátt, at limirnir í musikkskúlanevndini avleiða demokratiskt vald frá fólkavaldu kommunustýrislimunum í mentanarnevndunum í kommununum í Suðuroy, samstundis sum tann heldur ótíðarhóskandi lóggávan á økinum frá 1984 einki nærri sigur um, hvør setir lokala musikkskúlaleiðaran.

Hinvegin ber til at siga, at interkommunala musikkskúlanevndin hevur fingið setanar- og harvið eisini uppsagnarmyndugleika í mun til lokala musikkskúlaleiðaran. Slíkt virksemi fellir uttan iva inn undir fyrisitingarligt avgerðarvirksemi, og harvið er tað eisini latið myndugleikavirksemi til musikkskúlanevndina. Musikkskúlanevndin er interkommunal, og í mun til einstøku kommununa er tað harvið í stóran mun talan um delegatión av avgerðarvirksemi til eitt organ, sum er uttan fyri

einstaka kommunala hierarkiið. Slík delegatión krevur eftir meting Mentamálaráðsins lógarheimild.

Tá ið interkommunala musikkskúlanevndin er vald av øllum kommununum í Suðuroy, er tað eisini ivasamt, hvør stendur við arbeiðsgevaraábyrgdini av lokala musikkskúlaleiðaranum. Soleiðis sum tað sæst í málinum, tykist avgerðin um at seta lokala musikkskúlaleiðaran *reelt* ikki at vera ein avgerð, sum bý-/ella bygdaráðini hava tikið, hóast tað sambært vanligu reglunum á kommunala økinum, rundskrivinum um musikkskúlar og reglugerðini fyri Musikkskúlan í Suðuroy, eru bý- og bygdaráðini, ið seta kommunalar leiðarar. Nevndin er sambært § 6 í reglugerðini fyri Musikkskúlan í Suðuroy bert tilmælandi í mun til bý- og bygdaráðini.

Atlitið at lata interkommunalu musikkskúlanevndini setanarmyndugleika tykist vera grundað á praktisk viðurskifti, tí sum tað stendur í telduposti frá H, formanni í nevndini fyri Suðuroyar musikkskúla, til musikkskúlaleiðaran, F, dagfest 18. august 2015, hevur tað altíð verið nevndin, sum hevur sett lokala leiðaran. H sipar í teldupostinum til upprunaliga leiðaran fyri nevndina, I:

*"Det ville være noget tungt system, hvis man skulle spørge 7 kommunestyrer hver gang."*

Talan er sostatt um eina uml. 30 ára gamla siðvenju á økinum, sum á ivasomum grundarlagi lúkar heimildarkravið innan fyrisitingarrættin, tá ið viðvíkur kommunalari delegatión til eitt sjálvstøðugt organ, sum í mun til einstøku kommununa í stóran mun fellir uttan fyri tað kommunala hierarkiið.

Vísandi til omanfyri standandi metir Mentamálaráðið tað vera ivasamt, hvørt nøktandi heimild er fyri at lata interkommunalu musikkskúlanevndini myndugleikauppgávur í sambandi við avgerð um setan av lokala musikkskúlaleiðaranum, hóast hevur hetta verið ein siðvenja í uml. 30 ár."

Skrivið frá Mentamálaráðnum varð 25. september 2015 sent Tvøroyrar kommunu sum umboðandi kommunurnar í samstarvinum til viðmerkingar.

Fámjins kommuna svaraði 30. september 2015 soleiðis :

" Fámjins kommuna tekur undir við verandi praksis á økinum, og mælir til, at viðtøkurnar verða broyttar, so tær samsvara verandi praksis."

Tvøroyrar kommuna svaraði 12. november 2015 soleiðis :

"Tvøroyrar býráð viðgjørdi skriv tygara dagf. 25.09.2015 á fundi hin 11.11.2015. Býráðið hevur hesar viðmerkingar til málið.

Tvøroyrar býráð metir eina setanartilgongd, har øll kommunustýrini í oynni skulu seta leiðaran í musikkskúlanum, vera sera tunga og óneyðuga langa. Tískil tekur býráðið undir við verandi praksis og vil mæla til, at heimild verður fingin til vega, so at nevndin fyri musikkskúlan hevur setanarmyndugleikan á økinum."

Ongar viðmerkingar komu frá hinum kommununum.

Tann 19. november 2015 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um setanarheimild og mannagongdir í samband við setan av lærara og leiðara fyri Musikkskúlan í Suðuroy. Viðvíkjandi lærara er talan um eina fyribilssetan og viðvíkjandi leiðaranum er talan um fyribilssetan og setan í áramálssett starv.

Reglugrundarlagið fyri musikkskúlar er ásett í løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996 og í rundskrivi um musikkskúlar frá 28. januar 1985 frá táverandi Landsskúlaráði. Fyri Musikkskúlan í Suðuroy er eisini galdandi Reglugerð fyri Musikkskúlan í Suðuroy, sum tekur útgangsstøði í rundskrivinum frá 28. januar 1985.

*Setan av lærara*
Sambært § 5 stk. 2 í lógini um stuðul til musikkskúlar er ásett, at landsstýrismaðurin setir lærarar í starv í musikkskúlanum eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu ella kommunufelagsskapi ella nevndini fyri musikkskúlan. Í praksis er tað musikkskúlaleiðarin, sum settur er sambært § 6 í lógini, sum eftir tilmæli frá viðkomandi kommunu ella kommunum setir lærararnar í musikkskúlanum .

Í hesum máli sæst, at tá lærarar søgdu seg úr starvi 1. desember 2013, avgjørdi musikkskúlaleiðarin eftir samráðing við musikkskúlanevndina fyri Musikkskúlan í Suðuroy m.a. at seta annan lærara í starv 10 tímar um vikuna at rokna frá 13. januar 2014 og í eitt fyribilstíðarskeið upp á í mesta lagi 3 mánaðir. Starvið varð ikki lýst leyst, men heitt varð á ein lærara við kravdari útbúgving at átaka sær hesa uppgávu. Tann 19. mars 2014 varð starvið lýst leyst til setan frá 07. apríl 2014 og restina av skúlaárinum.

Sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Musikklærarafelag Føroya hevur ásetingar um starvsfólk, sum eru sett í fyribilsstarv í styttri tíð enn 3 mánaðir, men hevur ikki nakra ítøkiliga áseting um, nær størv skulu lýsast leys. Tá talan er um alment starv, skal almenni setanarpolitikkurin fylgjast. Í hesum setanarpolitikki er ásett, at øll størv eiga at vera lýst alment.

Eg havi spurt lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, sum umsitur almenna setanarpolitikkin, um tað í praksis er nøkur siðvenja fyri at gera undantak frá kravinum um, at øll almenn størv eiga at vera lýst leyst alment. Lønardeildin hevur greitt frá, at í nógvum sáttmálum við tað almenna eru ásetingar um, at størv skulu verða lýst leys at søkja, men í sáttmálum eru eisini undantøk fyri fyribilsstørv í styttri tíðarskeið uppá tríggjar mánaðir ella upp í seks mánaðir, og at tað annars veldst um ítøkiligu umstøðurnar í málinum.

Umstøðurnar í hesum máli vísa, at talan er um eina skiftisstøðu, eftir at lærarar hava sagt seg úr starvi mitt í einum skúlaári, og inntil starvið verður lýst leyst. Tá tað sostatt eru ítøkiligar sakligar grundir, sum eru orsøk til, at frávik er gjørt frá generella kravinum í setanarpolitikkinum um, at øll almenn størv skulu lýsast leys, havi eg einki at viðmerkja til sjálva fyribilssetanina av lærara 10 tímar um vikuna í hesum stutta tíðarskeiðinum.

*Setan av leiðara*

Samsvarandi § 6 í lógini um stuðul til musikkskúlar er ein leiðari settur at samskipa alla musikkundirvísing í Føroyum. Í lógini um stuðul til musikkskúlar, er einki beinleiðis nevnt um lokalan musikkskúlaleiðara hjá kommunum ella interkommunalari skipan, men eftir § 3 stk. 1 skal ein kommunalur ella interkommunalur musikkskúli verða góðkendur av landsstýrismanninum og lúka ávísar treytir fyri at fáa studning.

Treytirnar, sum settar vera einum musikkskúla, eru ásettar í § 3 stk. 2 í lógini um stuðul til musikkskúlar og eru eisini endurgivnar í rundskrivinum frá 28. januar 1985 um musikkskúlar.

Í § 8 í rundskrivinum um musikkskúlar, er ásett :

> "**§ 8.** Fyri teir kommunalu ella interkommunalu musikkskúlarnar kann nevnd verða sett til tess at skipa fyri undirvísingini í umveldunum. Bý-/bygdarráðið setir hesa nevnd, sum í hesum sambandi skal umboða fyritakssemið á staðnum.
> *2. stk.* Bý-/bygdarráðið setir ein leiðara, ið hevur ta dagligu leiðsluna av musikkskúlanum á staðnum."

Eftir § 8 stk. 2 er greitt, at tá talan er um at seta leiðara, sum hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum í einari kommunu, er tað bý- ella bygdaráðið, sum er setanarmyndugleiki. At Musikkskúlin í Suðuroy er ein interkommunal skipan, ávirkar ikki setanarheimildina í § 8 stk. 2 annað enn, at tað gerast fleiri bý – ella bygdaráð, sum í felag standa fyri setan av leiðaranum í mun til, tá talan bert er um eina kommunu og eitt bý – ella bygdaráð.

Líknandi áseting sum § 8 stk. 2 í rundskrivinum er eisini í § 6 í reglugerðini fyri Musikkskúlan í Suðuroy.

Í mun til setan av leiðara havi eg serliga viðgjørt spurningin, um musikkskúlanevndin fyri Musikkskúlan í Suðuroy, sum bæði hevur sett fyribilsleiðara og áramálssettan leiðara í starv, hevur neyðugu heimildina sum setanarmyndugleiki.

Mentamálaráðið hevur í sínum hoyringarskrivi víst á, at setan av leiðara til kommunalan musikkskúla er ein rein kommunal uppgáva. Hesum eri eg samd í. Viðmerkjast kann, at hetta vildi eisini verið støðan, um einki rundskriv var frá landsskúlafyrisitingini.

Í mun til delegatión av setanarmyndugleikanum skrivar Mentamálaráðið í hoyringarskrivinum frá 21. september 2015... :

> "...interkommunala musikkskúlanevndin hevur fingið setanar- og harvið eisini uppsagnarmyndugleika í mun til lokala musikkskúlaleiðaran. Slíkt virksemi fellir uttan iva inn undir fyrisitingarligt avgerðarvirksemi, og harvið er tað eisini latið myndugleikavirksemi til musikkskúlanevndina. Musikkskúlanevndin er interkommunal, og í mun til einstøku kommununa er tað harvið í stóran mun talan um delegatión av avgerðarvirksemi til eitt organ, sum er uttan fyri einstaka kommunala hierarkiið. Slík delegatión krevur eftir meting Mentamálaráðsins lógarheimild...
>
> Vísandi til omanfyri standandi metir Mentamálaráðið tað vera ivasamt, hvørt nøktandi heimild er fyri at lata interkommunalu musikkskúlanevndini myndugleikauppgávur í sambandi við avgerð um setan av lokala musikkskúlaleiðaranum, hóast hevur hetta verið ein siðvenja í uml. 30 ár."

Eg eri samd við Mentamálaráðnum í, at eitt bý- ella bygdaráð ikki kann delegera heimildina at seta leiðara til kommunalan musikkskúla til eina nevnd uttanfyri kommunala avgerðarmyndugleikan, og sum ikki er ein bý- ella bygdaráðsnevnd, sett og skipað eftir § 28 í kommunustýrislógini.

Tað er ein fyrisitingarlig avgerð, at seta leiðara á kommunalum musikkskúla í starv. Ein kommuna, sum hevur heimild at taka fyrisitingarliga avgerð á einum øki, kann ikki uttan lógarheimild lata avgerðarheimildina til onnur, tí við hesum kunnu fyri borgaran avgerandi fyrisitingarligar verndarreglur falla burtur í viðgerðini. Hetta er eisini galdandi, tá talan er um setan av leiðara fyri kommunalan ella interkommunalan musikkskúla. Tað eru bý/bygdaráðini, sum eru setanarmyndugleiki, og avgerðin kann ikki latast øðrum uttan við lóg. Annað er, at fyrireikingin av einum setanarmáli við ávísum treytum t.d. um tagnarskyldu og viðgerðarmannagongd kann leggjast til onnur t.d. eina nevnd skipað eftir § 36 í kommunulógini, og at hendan so kann vera tilmælandi í mun til setanarmyndugleikan.

Hóast nevndin fyri Musikkskúlan í Suðuroy í mong ár hevur virkað sum setanarmyndugleiki í mun til setan av leiðara fyri musikkskúlan, ávirkar hetta ikki spurningin um setanarheimildina, tí hendan kann í slíkum førum bert flytast við lóg frá einum kommunustýri til eina uttanhýsis kommunala nevnd.

Tá setanin av leiðaranum fyri Musikkskúlan í Suðuroy er framd av nevnd, sum ikki hevur neyðuga fyristingarliga heimild sum setanarmyndugleiki, er talan um óheimilaða setan. Avgerðir, sum eru tiknar í heimildarloysi, hava sum útgangsstøði ikki gildi. Tí er neyðugt, at setanarmálið fær eina nýggja viðgerð av rætta setanarmyndugleikanum, sum í hesum máli eru bý - og bygdaráðini, sum varða av Musikkskúlanum í Suðuroy.

Eg fari tí í hesum áliti ikki at viðgera sjálva setanina og um setanarmannagongdin hevur tryggjað, at tann besta skikkaði er settur í starv, men fari at biðja kommunurnar, ið varða av Musikkskúlanum í Suðuroy, um at viðgera málið í síni heild, og taka ítøkiliga støðu í málinum um setan av leiðara fyri musikkskúlan.

Óheimilað delegatión av setanarmyndugleika, sum viðførir, at avgerðir verða tiknar í heimildarloysi, er álvarsamt brot á fyrisitingarligar reglur. Tað er sera týðandi, at tað verður rættað uppá tey mál, har avgerðarheimildin ikki hevur verið til staðar, og at uppafturtøkan verður framd soleiðis, at talan reelt gerst um eina nýggja viðgerð av málinum.

Eg fari tí at biðja landsstýriskvinnuna í kommunumálum um at hava eftirlit við, at avgerðin í hesum máli verður tikin á røttum stað og at lata meg frætta aftur hesum viðvíkjandi.

Í viðgerðini av málinum havi eg staðfest, at lógin um stuðul til musikkskúlar ikki er dagførd samsvarandi teimum broytingunum, ið eru í mun til umsitingina av økinum, og at ásetingar, sum eftir nútíðar lóggávumannagongdum vildu verið framdar við kunngerð, eru ásettar í rundskrivi. Landsgrannskoðanin hevur eisini í fleiri ár víst á, at tørvur er á at fáa lógarverkið um musikkskúlar dagført. Eg fari tí at mæla Mentamálaráðnum til at dagføra regluverkið fyri musikkskúlar.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður